# Lógarverkið á internetið

Løgmansskrivstovan er komið væl ávegis við arbeiðnum at gera føroyska lógarverkið teldutøkt.

Hetta upplýsti løgmaður í løgmansrøðuni, tá tingið var sett á ólavsøku.

Løgmansskrivstovan hevur seinastu tvey árini arbeitt við at gera alla tað føroysku lóggávuna teldutøka, og úrslitið av hesum verður, at um stutta tíð verða lógirnar at finna á internetinum.

– Hetta ger tað lætt hjá fólki at fáa kunnleika til lóggávuna, og tað kann betra munandi um rættartrygdina hjá borgarunum, segði løgmaður í røðuni.

Arbeitt verður eisini framhaldandi við at menna skipanina soleiðis, at hon, um framt at fevna um tað, sum verður kunngjørt í Kunngerðarsavninum, eisini skal fevna um dómar og prinsipiellar umsitingarligar avgerðir.

**ek**

# Fullkomin fríhandil

Samráðingarnar hjá landsstýrinum við Russland og Letland um sínamillum fríhandilssáttmálar eru um at vera loknar. Sáttmálin við Russland verður væntandi fullkomin fríhandilssáttmáli við ongum avmarkingum fyri vøruhandil.

# Samráðast við ES

Landsstýrið ætlar at leggja uppskot fyri løgtingið um nýggjar samráðingar við ES.

Hetta segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, í løgmansrøðuni á Ólavsøku.

Hann vísti á, at tá Danmark fór upp í ES í 1973, fóru Føroyar saman við Danmark burtur úr EFTA. Føroyar hava síðani ikki havt møguleika fyri at luttaka í eitt nú EBSøsamstarbvinum millum ES og EFTA ella í fríhandilssáttmálum, sum EFTA hevur gjørt við londini í Eystureuropa og annars uttan fyri Europa.

Fyri at bøta um støðuna hjá Føroyum í hesum høpi fer landsstýrið at taka samstarvið við ES upp til nýggja viðgerð. Landsstýrið fer at leggja eitt uppskot fyri løgtingið um at biðja ES um nýggjar samráðingar.

– Um løgtingið tekur undir við hesum uppskotið, fer løgmaður til Brússel seint í heyst at handa formanninum í ES-nevndini eina áheitan um samráðingar. Gongst sum ætla kann vónandi vera farið undir samráðingar einaferð seint næsta ár, segði Anfinn Kallsberg í røðuni.

**ek**

# Gongur undan við vatni í Havn

Óvanliga turrveðrið í juli mánaði hevur havt við sær vatntrot kring alt landið, og tað eru nakað síðani at fyrstu áheitaninar á fólk um at spara vatn komu.

Eisini í Havn, har tvær stórar vatngoymslur eru, gongur undan við vatninum. Nógv vatn er framvegis í byrgingini í Havnardali, men lítið er eftir í Villingardali. Har hevur ongantíð verið so lítið vatn, síðani goymslan var tikin í nýtslu á sumri í 1988.

Hóast nóg mikið av vatni er í Havnardali, ber ikki til at at lata allan høvuðsstaðin fáa vatn haðani. Hetta kemst av rørskipanini og hæddarviðurskiftum.

### Kóka vatnið

Men fyri at dríggja um vatnið, sum er eftir í Villingardali, fáa fleiri býlingar, ið vanliga fáa vatn haðani, nú vatn úr Havnardali ístaðin.

Alt vatnið, sum nú verður latið úr Havnardali, fer beinleiðis úr byrgingini uttanum reinsiverkið. Klor verður latið út í vatnið, og tí heitir Tórshavnar kommuna á fólk um at kóka vatnið, áðrenn tað verður drukkið.

Nakrir býlingar fáa framvegis vatn úr Villingardagli. Hesir eru ovari partur av Villingardalsvegnum, Ternuryggur, Vesturi á Flat, Millum Gilja, Lítla Gil, Eystan Gil, fram við Vegnum Langa og Inni á Gøtu.

Tórshavnar kommuna heitir eisini staðiliga á fólk og virki um at spara vatn, og um onkur verður varugur við ein vatnleka, so er at siga kommununi frá beinanvegin.

**ek**



*Tórshavnar kommuna heitir nú staðiliga á fólk og virki um at spara vatn*

# Óvanliga nógv fólk vitja í Svínoy



Hóast svínoyingar fingu framkomið internetsamband fyrr í summar, nýtist teimum ikki at fara á netið fyri at samskifta við fólk úr øðrum plássum í Føroyum.

Svínoyingar hava nevniliga havt óvanliga nógvar gestir í oynni higartil í summar.

– Tað hava ikki verið so nógv fólk í oynni í nógv ár, sigur Jógvan Edmund á Geilini, sum er bygdaráðsformaður í Svínoy.

Hann sigur, at fólk eru í øllum húsunum í Svínoy, og talan er serliga um føroyingar.

– Summi eru og vitja skilfólk her, men her eru eisini onnur, sum ikki hava tilknýtið til staðið sum so, sigur hann.

Nakað av útlendingum vitja, men serliga eru tað føroyingar, sum koma til Svínoyar.

**ek**

# Hjálpir at biða fólk spara vatn

Í Klaksvík er framvegis væl av vatni eftir í goymslunum í Ánagjógv og á Hálsi, men heldur turkurin fram í langa tíð afturat, so fer at standa á við vatni.

Klaksvíkar kommuna steingir hvørja nátt vatnveitingina úr brunnunum á Hálsi, og tað hevur hjálpt, at hetta hevur verið mannagongdin í meira enn tvær vikur.

Harafturat hjálpir tað eisini at biða fólk og virki um at spara vatn. Hesar áheitanir taka fólk í álvara, og tað er viðvirkandi til, at tað framvegis er vatn eftir í goymslunum.

Vestari armur fær vatn úr brunnunum á Hálsi, meðan øll virkini og eystari armur fáa vatn frá nýggja reinsiverkinum í Ánagjógv. Hendan goymslan, sum fær vatn úr Svartadali og Strandadali, verður ikki stongd eins og tann á Hálsi.

**ek**

*Tað hevði komið væl við hjá vatngoymslunum, um tað regnaði ein av komandi døgunum, men til ta tíð mugu fólk og virki spara vatn*





# Sløkkiliðnum í Havn manglar vatn

*Ein størri eldsbruni hevði givið sløkkiliðnum stórar trupulleikar, tí vatn er einans á goymslu til fimm minuttir. Og óvissað er, um nakar dropið yvirhøvur kemur úr brandpostunum*

Dia Midjord

– Ein stórur eldsbruni kann altíð koma, men oddsini eru sera vánalig, nú turkur er og nærum onki vatn er til.

Orðini eigur maðurin, ið stendur við ábyrgdini, um eldur verður fráboðaður í Tórshavnar Kommunu. Og sterkasta amboð hansara er vatn, men tað hevur turrveðrið beint fyri.

Fólk spyrja tí, um sløkkiliðið hevur nokk av vatni.

– Tað vita vit ikki, fyrr enn eldur hevur verið, sigur Peter Seloy, sløkkiliðsstjóri.

### 10 tons á goymslu

Verður eldur fráboðaður, kann sløkkiliðið møta á staðnum við trimum bilum, ið tilsamans hava tíggju tons av vatni. Ein bilur hevur seks tons og tveir hava tvey tons hvør.

Men er talan um stóran eld í tættbygdum øki, røkkur hetta ikki serliga langt.

– Eftir fimm minuttum so er alt tómt, sigur Peter Seloy.

– Og tá vatni er uppi, tá er sløkkiarbeiðið liðugt, um vit ikki fáa vatn út vatnpostunum, leggur hann aftrat.

Er einki vatn í postunum, má ein alternativ vatnveiting koma ístaðin. Og tað er, at tangabilur koyrir til og frá onkrum vatnposti, ið er bundin til vatngoymsluna í Havnardali.

### Nýggjan tangabil

Hóast vatntrot er, so er Tórshavnar Sløkkilið ógvuliga væl fyri við útgerð og fyrireiking. Eitt nú kann nýggi stigabilurin, ið røkkur tredivu metrar upp, spjaða vatnið soleiðis, at tað dekkar eitt stórt umráði.

– Hetta er sera hent, um vit skulu berjast við ein størri takeldsbruna, sigur Peter Seloy.

Og ein tangabilur, ið rúmar 15 tons, er eisini ávegis. Hann kemur einaferð seinni í heyst.

### Verið ansin

Týsmorgunin var sløkkiliðið úti í sambandi við, at onkur hevði tveitt grillkol niður í turt gras. Tað hendi einki hesaferð, men sløkkiliðsstjórin ávarar fólk og biður tey vísa serligan ans, nú drúgt turrveður hevur ligið leingi.

– Tað skal nærum einki til, so fær eldurin fastatøkur, sigur Peter Seloy.



# 300 krónur, takk

*Royndartíðin er av og tygum fáa ikki fleiri ávaringar frá løgregluni, um snakkað verður í hándhildnari fartelefon í bilinum*

Dia Midjord

Ein mánaði er liðin síðani nýggja ferðslulógin kom í gildi, og nú er ongin góða mamma. Politistarnir, ið blíðskortaðir hava vent sær til fólk við ávaringum, fara nú at biðja um navn og bústað.

– Royndartíðin er av, og bøtur verða nú givnar, sigur politikommiserurin Uni Vestureið.

### 300 krónur

Leggur tú ikki óvanan á hillina, so kann talan gerast um ein dýran biltúr. Eitt er at vanligi taksturin skal rindast, men sær løgreglan teg snakka, so skalt tú leggja 300 krónur aftrat hesum gjaldi.

Støðleiðarin á Politigarðinum í Havn, Peter Poulsen, sigur, at løgreglan hevur snakkað við nógv fólk hesa royndartíðina, og at fleiri framvegis snakka í hándhildnari fartelefon, meðan koyrt verður.

### ...tað var ikki eg

Um løgreglan vendir sær til tín og fráboðar, at tú hevur snakkað í fartelefon, meðan tú hevur koyrt bilin, er torført at sleppa undan bótini.

Tú fært nevniliga eina bót sendandi, og rindar tú ikki hesa, mást tú møta í rættinum. Har førir ákæruvaldið tey vitni fram - í flestu førum er hetta politistar - sum hava sæð teg snakkað við fartelefonini.

Tú sleppur at geva tína frágreiðing og so er tað upp til tann svartkladda mannin við tí gráa, krúlluta parykkinum at avgera, hvørjum hann velir at trúgva. Tær ella vitnunum.



# Sirkus Agora vitjar

*Fimm framførslur vera á skránni, tá Sirkus Agora úr Noregi vitjar komandi vikuskiftið*

Dia Midjord

Hóast Sirkus Agora ikki hevur dýrini við á føroyaferðini, so lovar sirkusstjórin Jan Ketin Smørdal, at føroyingar skulu fáa eitt ríkt upplivilsi.

– Vit hava eitt nú klovnar, sjónleikarar, línudansarar, luftsnillingar og sjonglørar á skránni. Vit eru júst liðug við framførslurnar í Reykjavík, og Morgunblaðið gav sirkusinum sera góða umrøðu, sigur Jan Ketil Smørdal.

– Eg kann nevna, at brúðurdóttur Gorbatjov, Liubov Gorbachova, fer at vísa síni kynstur við sonevndum hula-hopp ringum, sigur sirkusstjórin.

Umframt eru argentinarar á skránni, ið dansa eftir trummuslátti. Teir framføra m.a. »Riverdance«

### Fimm framførslur

Klokkan sjey fríggjakvøldið verður fyrsta framsýningin hjá Sirkus Agora í Føroyum. Leygardagin verða framsýningar klokkan trý og seks og sunnudagin verða framførslur sama tíðspunkt.

Kostnaðurin er ikki fastlagdur enn, men tað verður eitt stað millum 180 og 250 krónur, alt eftir hvussu góðan sess man hevur í stóra teltinum.

Tað er Jan Ketin Smørdal, ið er oddamaður í Sirkus Agora. Hann hevur síðan 1988 staðið við endan, tá Sirkus Agora hevur havt framførslur í Noregi. Hetta er sostatt tólvta sesongin hjá honum.


## Starvsfólk til Føroya Tele

**Internet Support**

Hevur tú hug at arbeiða innan eitt øki í støðugari menning og við nógvum avbjóðingum, har vit leggja stóran dent á at vera fremst innan hesa tøkni í Føroyum, ert tú møguliga rætti persónurin at starvast á okkara deild.

Sum høvuðsuppgávu fært tú ábyrgd av at stovna nýggjar kundar umframt support og viðlíkahald av teimum kundum, sum vit longu hava.

Vit bjóða sera áhugaverdar arbeiðsumstøður á Internet-deildini á Føroya Tele, har uppgávurnar m.a. eru:

- at veita viðskiftafólki ráðgeving um internetspurningar
- at stovna konti til viðskiftafólk
- at menna kundatænastuna
- at menna nýggjar internettænastur
- at røkja postambætarar

Tað er eitt krav, at tú:

- hevur kunnleika til internet uppringt samband
- hevur kunnleika til internet postskipanina

Tað er ein fyrimunur, um tú:

- í stóran mun dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ert nærlagdur/nærløgd
- hevur kunnleika og royndir innan TCP/IP og Internet
- hevur kunnleika til Windows-NT
- hevur kunnleika til og royndir við Unix
- ert fyrikomandi og dugir væl at tosa við viðskiftafólk
- hevur hugsjónir um Internet
- dugir enskt

Vit rokna við, at tú hevur EDV-útbúgving, tekniska útbúgving ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Páll Wiberg Joensen á tlf. 30 30 30

Umsóknir við hjáløgdum prógvum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. august 2000.

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355